Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jaspur Langgaard, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Ferðslukostnaður og rakstur av Eysturoyartunlinum uttan Sandoyartunnilin

Spurningar:

1. Hvør hevði ferðslukostnaðurin verið, um Eysturoyartunnulin bara skuldi fíggjað seg sjálvan við verandi ferðslu, um ikki Sandoyartunnilin varð knýttur at?
2. Hvat hevði úrslitið av rakstrinum fyri Eysturoyartunnlin verið uttan Sandoyartunnilin við verandi ferðslu?
3. Hvussu er býtið av løgukostnaðinum fyri ávikavist Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin?
4. Verður tørvur á hægri lántøku í sambandi við báðar verkætlanirnar?
5. Hvørji eru útlitini fyri einum pendlara-prísi?

Viðmerkingar:
P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur í løtuni trupulleikar við at fáa raksturin at hanga saman; serliga er tað vantandi ferðsla í mun til skuldina, sum er viðvirkandi til íkomnu fíggjarstøðuna. Útlit eru fyri einum rímiliga stórum rakstrarhalli upp á einar 47 mió. kr. árliga, alt annað líka.

Tað er onki yvir at dylja, at skuldi Sandoyartunnilin byggjast, so mátti verkætlanin tengjast saman við Eysturoyartunlinum og inntøkugrundarlagnum hjá honum.

Tað er ikki gjørligt í løtuni at síggja, hvussu hvør rakstrareind/tunnil ber seg fíggjarliga ella hongur saman, inntøkur, útreiðslur o.a. Tí hevði verið gott við einari útgreining av rakstrinum.

Endamálið er at skapa betri gjøgnumskygni í rakstrinum hjá felagnum og tryggja, at prísáseting og átøk verða gjørd rætt og málrættað.

Fyri landskassan er samlaða byggiverkætlanin við til at tyngja landskassan, nakað sum ongantíð hevur verið ætlanin. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 22. oktober 2021

Jaspur Langgard